ítróttur

Nr. 29 • hósdagur • 9. februar 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo

# Birgir ætlar at ganga stillisliga við hurðunum

**Birgir Enghamar váttar nú, at hann er í uppskoti til formansvalið í FSF, men hann ætlar sær ikki at føra nakað alment valstríð undan aðalfundinum hjá FSF**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

HB-formaðurin seinastu fimm árini ætlar sær at gerast formaður í Fótbóltssambandinum.

Tað váttar Birgir Enghamar sjálvur, eftir at uppskotið um at velja hann sum formann er latið FSF.

– Jú, eg kann vátta, at fleiri feløg hava tikið seg saman um at skjóta meg upp til formansvalið, sigur Birgir Enghamar.

– Tað rokni eg við, at tey hava gjørt út frá tí, sum eg havi ført fram til seinastu tveir formansfundirnar í FSF, sigur hann.

Birgir Enghamar vil ikki greiða frá, hvat hann hevur í kvittanum sum formaður í FSF.

– Eg ætli mær at siga sum minst áðrenn aðalfundin. Eg hava verið í sambandi við øll feløgini og sagt teimum, at eg stilli upp. Tey vita, hvat eg standi fyri, sigur hann.




*– Tað kann als ikki sammetast at verða formaður í einum felag og í FSF. HB hevur einki lønt skrivstovufólk, og tí liggur sera nógv á formanninum. Hann skal kunna taka eina hond í allastaðni. FSF hevur hóast alt ein umsiting við fleiri fólkum í starvi, og tí er tað kunnu hesar báðar uppgávurnar als ikki samanberast, sigur Birgir Enghamar*

**HB og FSF kann ikki samanberast**

Birgir Enghamar hevur sitið í nevndini hjá HB í seks ár. Seinastu fimm árini hevur hann verið formaður í HB, men hann legði frá sær á aðalfundinum í síðstu viku. Hetta kom eitt sindur óvart á teir flestu fundarluttakararnar, men samstundis fór hann í holt við at savna sær undirtøku til formansvalið í FSF.

Tú legði frá tær í HB, tí tú ikki orkaði tað uppgávuna longur. Ert tú til reiðar at taka við sum FSF-formaður?

– Tað kann als ikki sammetast at verða formaður í einum felag og í FSF. HB hevur einki lønt skrivstovufólk, og tí liggur sera nógv á formanninum. Hann skal kunna taka eina hond í allastaðni. FSF hevur hóast alt ein umsiting við fleiri fólkum í starvi, og tí er tað kunnu hesar báðar uppgávurnar als ikki samanberast.

**Avgerðin fellir um 9 dagar**

Aðalfundurin hjá Fótbóltssambandinum verður leygardagin 18. februar, og tað skulu feløgini og nevndin í FSF velja ímillum tvey uppskot til formansvalið. Óli Holm, sum hevur verið formaður seianstu tvey árini, stillar uppaftur, og hann skal royna verða afturvaldur í kapping við Birgir Enghamar.

Fram hevur vegna 15 feløg skotið Birgir Enghamar upp sum formann í FSF, og hetta uppskot er latið FSF. Freistin at stilla upp er annars hóskvøldið.

Feløgini, sum eru limir í FSF, eiga eina atkvøðu í part, og nevndin í FSF hevur somuleiðis eina atkvøðu í formansvalinum.

# Óli tekur kampin upp

**Óli Holm stillar upp aftur sum formaður í FSF, hóast mótvalevnið hjá honum er skotið upp av einum greiðum meiriluta av føroysku fótbóltsfeløgunum**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Óli Holm hevur verið formaður í Fótbóltssambandinum seinastu tvey árini, og hann er til reiðar at taka við afturvali á aðalfundinum 18. februar.

– Tað er ein ringur vani at trekkja seg, bara tí tað lotar úr hanakjafti. Eg eri til reiðar at taka dystin upp við Birgir Enghamar, sigur Óli Holm.

Hvat sigur tú til, at 15 feløg eru við til at skjóta hann upp ímóti tær?

– Ja, eg kann bara staðfesta, at hesi feløgini hava tikið seg saman um uppskotið, meira havi eg ikki at viðmerkja.

**Gott við vali**

Óli Holm hevur drúgvar royndir í arbeiðnum í Fótbóltssambandinum, og eftir nakað av ófriði var um formanssessin fyri tveimum árum síðani, endaði tað við, at Óli Holm varð valdur, eftir at fleiri onnur valevnið stillaðu upp og trektu seg.

Nú skal Óli kappast við Birgir Enghamar um formanssessin, men hann sær einki galið í hesum.

– Tað er gott, at feløgini hava tvey valeyni at velja ímillum, sigur Óli Holm.



*– Tað er ein ringur vani at trekkja seg, bara tí tað lotar úr hanakjafti. Eg eri til reiðar at taka dystin upp við Birgir Enghamar, sigur Óli Holm, formaður í FSF*

## Freistin er longd

Freistin at tekna seg til kappingina í innandurarógving í Havn leygardagin er longd til á midnátt hóskvøldið. Hetta ger Havnar Róðrarfelag fyri at fáa fleiri ungfólk og fleiri kvinnur at tekna seg til kappingina.

Higartil hava fleiri enn hundrað rógvarar teknað seg til kappingina, og fyrireikararnir halda, at fleiri ungfólk kunnu verða við í kappingini. Kring landið rógva bæði gentur og dreingir í rógvumaskinum, men tey hava ikki hildið seg fram at til kappingina leygardagin – men nú fáa tey ein kjans afturat.

Kappingin verður á Eysturskúlanum í Havn leygardagin.

## Atli í Frem

Atli Gregersen var við á liðnum hjá Frem, sum spældi venjingardyst ímóti B93 mikukvøldið. Bæði Jónas Tór Næs, sum hevur spælt í felagnum í fleiri ár, og Atli Gregersen komu á vøllin í hálvleikinum í dystinum. Jónas spældi høgri bakkur, meðan Atli varð settur inn í miðverjuna. Atli Gregersen hevur áður roynt seg í donskum fótbólti, men hann hevur verið heima og spælt í tvey tey seinastu kappingarárini við GÍ. Atli fór av landinum aftur miðskeiðis í kappingini í fjør, og nú roynir hann seg í 1. deildarfelagnum Frem. Málmaðurin Gunnar Nielsen var ikki á vøllinum í dystinum ímóti B93, sum endaði við javnleiki 1-1. Heimasíðan hjá Frem skrivar, at liðið fekk betur tak á dystinum í seinna hálvleiki, tá ið tað eisini eydnaðist at javna leiðsluna hjá B93.

## SvF sendir beinleiðis

Sjónvarpið fer aftur í ár at senda beinleiðis frá steypafinalunum í hondbólti. Finalurnar verða spældar í ítróttarhøllini á Hálsi í Havn leygardagin. Sjónvarpið sendi kvinnufinaluna frá kl. 14.45, og frá kl. 16.45 er mansfinalan á skránni. Hjá kvinnunum eru tað Stjørnan og Neistin, sum spæla, og hjá monnunum er finalan ímillum StÍF og VÍF.